## Góð arbeiðsmegi

Danskar fyritøkur, sum hava eysturevropear í arbeiði, eru væl nøgdar við ta fremmandu arbeiðsmegina. Ein kanning, sum umfatar 38 fyritøkur við útlendskari arbeiðsmegi, vísir, at tey fremmandu hava færri fráverudagar enn teirra donsku starvsfelagar, og harafturat er tað eisini lættari at fáa tey at arbeiða yvirtíð. Men fakfelagið 3F heldur ikki, at samanberingin er røtt, tí tey fremmandu hava ikki familju og børn at taka sær av aftan á arbeiðstíð.



*Eysturevropear eru støðug arbeiðsmegi, vísir donsk kanning (Mynd: TV2)*

# bygdaogn í Vági





*Hans í Líðini, reiðari á Beinisvørði, fegnast um tann uppbakning, sum verkætlanin hevur fingið*

*Mynd: Finnur Johannesen*

Í 2001 fekk skipið nýggjar og stórar ljósmotorar og nýtt róður. Spølini eru elektrisk og eru soleiðis ikki knýtt at høvuðsmotorinum, sigur Hans í Líðini.

### Áhugin fløvar

Reiðarin hevur gjørt av ikki at upplýsa ney va keypsprísin á Beinisvørði, men sigur, at hann er heilt sámuligur, sum hann tekur til.

- Um vit bygdu eitt slíkt skip av hesi støddini, hevði tað helst kosta einar 50-60 miljónir krónur.

Hann vísir á, at uppi í felagnum hongur eisini skuldin, sum er eftir Sancy, og tí noyðist felagið at forsvara meira enn tað, sum íløgan í Beinisvørð er.

- Í løtuni er tað høgi oljuprísurin, sum drepur alt, men vit høvdu ikki gjørt hesa íløgu, um vit ikki hildu, at hon kann bera seg fíggjarliga. Tað hevur so ógvuliga nógv at siga í slíkum rakstri, at skipið kann kom inn um morgunin og loysa aftur um kvøldið, men tá krevst, at alt riggar, sum tað skal. Nú alt, sum hevur við fiskiveiðina at gera, skuldi verið í góðum standi umborð á nýggja skipinum, hava vit góðar vónir um, at hetta fer at bera til.

Reiðarin sigur, at eginpeningurin í felagnum Sancy Trawl er øktur við stívliga tveimum miljónum krónum upp í 4,8 miljónir krónur.

- Vit eru sera fegin um tann uppbakning, sum henda verkætlan hevur fingið – í fyrsta lagi í nærumhvørvinum, men eisini uttanfyri okkara økið.

Hann sigur, at nógvir eigarar eru í felagnum, og størsti einstaki er Rock Trawl Door.

- Vit eru eisini sera fegin um, at feløgini Fjallbrúður og Framtíðin vilja stuðla undir ætlanina, eins og handverkarafelagið, sum hevur verið við frá byrjan, framhaldandi er við í verkætlanini.

Reiðarin heldur, at tað er ikki at taka munnin ov fullan at siga, at Beinisvørð er bygdaogn í Vági.

- Øll fíggingin er føroysk, og eru tað Eik Banki og Realurin, sum hava fíggjað skipakeypið. Tað eru vit eisini sera takksom fyri, leggur Hans í Líðini aftrat.

### Ógvuliga spentir

Beinisvørð hevur góða last til kør, og tað er ein fyrimunur, tí tá tekur landingin styttri tíð. Lastin er soleiðis púrasta klár til fiskin, tá ið skipið ætlandi loysir seinni í hesum mánaðinum, um alt gongur, sum ætlað.

- Vit eru ógvuliga spentir upp á hesa verkætlan. Okkara mál var, at báturin skuldi koma higar til lands í góðum standi, vakur og nossligur, og tað halda vit, at hann er, sigur Hans í Líðini, reiðari.

# Krevur áræði og dirvi

**- Slíkar løtur eru lívgevandi og lyfta upp sinni, og vit eru errin av hesum fólkum, sum leggja rygg til slíkar verkætlanir, segði býráðslimurin, Jógvan Krosslá, tá ið Beinisvørð kom á Vág**

BEINISVØRÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var Jógvan Krosslá, býráðslimur í Vági, sum vegna Vágs kommunu beyð Beinisvørði, manning og eigarum vælkomnum á Vág við skipinum.

Hann segði, at tað er við gleði og stoltleika, at vit ynskja Beinisvørði vælkomnum til landið – og serliga vælkomnum til Vágs, sum hann tók til.

### Beinisvørð - tríggjar ferðir

Býráðslimurin segði, at tað var sluppin, ið Jákup Dahl keypti úr Íslandi í 1913, sum fekk navnið Beinisvørð.

- Skipið varð søkt 26. mars í 1941, einar 60 fjórðingar úr Nólsoynni, og øll manningin varð bjargað í øllum góðum.

Jógvan segði, at eitt annað skip, sum eisini fekk navnið Beinisvørð, var trolarin, sum P/F Garðar við Peturi Dahl, Jacob Dahl og Jákup Dahl, keyptu úr Íslandi í 1946.

- Hetta skip varð selt sum gamalt jarn í 1956.

Býráðslimurin segði, at nú kom so triðja skipið til Vágs – við sama navni, og eisini hesin trolarin er keyptur úr Íslandi, har hann kallaðist Andey.

- Tað er eitt sindur serstakt, at øll trý skipini við sama navni eru komin úr Íslandi, hóast eigararnir her heima eru ymiskir.

### Áræði og dirvi

Jógvan Krosslá segði seg fegnast um, at vágbingar eiga fólk, sum við áræði og dirvi vilja leggja rygg til slík skipakeyp.

- Løtur, sum hesar, eru lívgevandi og lyfta upp sinni, og vit eru errin av hesum fólkum, legði hann aftrat.

Hann vísti á, at ikki minst í fiskivinnuni eru upp-og niðurgangstíðir – og júst í løtuni er tungt at reka skip, tí oljuprísirnir eru risahøgir.

- Tit, sum leggja rygg til at keypa skip til Vágs, eiga rós frá okkum mongu sum vita, hvat skip og tey fólk, sum hava havt við skipini at gera, hava havt at týða fyri eitt pláss sum Vág.

### Einki av sær sjálvum

Jógvan vísti á, at mangan hevur spurningurin verður reistur, hvussu tað man bera til, at nakar tímir at fáast við skip, tá slíkar verkætlanir ofta hava trupulleikar og fíggjarligan váða við sær.

- Men eitt er vist, at Vágur hevði ikki verið tað pláss í dag, sum tað er – uttan skip og fólk, sum hava lagt rygg til, og tað eru mong húski, sum hava mist nógv við at gera íløgur, sum kundu gera tað liviligt í bygdini.

Býráðslimurin segði, at slíkt krevur sterk og røsk fólk, sum vilja nakað – og vita, at einki kemur av sær sjálvum.

- Vit vóna øll, at tykkum fer at gangast væl, og at tað fer at eydnast tykkum væl at fáa fisk, segði Jógvan Krosslá.